Orkar ikki meira

- Eitt arbeiði er ríkiligt fyri meg, sigur Karin Kjølbro, sum hevur boað frá, at hon ikki stillar upp til løgtingsvalið

Tað hevur einki við politisku støðuna at gera, at Karin Kjølbro ikki stillar upp til løgtingsvalið.

- Eg segði tað longu undan seinasta vali, at eg ætlaði at gevast, men tá helt eg meg noyðast at lata meg stilla upp aftur. Síðan havi eg nevnt tað fleiri ferðir, at eg vildi bara vera í tinginum hetta valskeiðið aftrat, og hava tey tikið meg í álvara, skuldi tað ikki komið so óvæntað, at eg gevist, sigur Karin Kjølbro.

Hon hevði tó ætlað at sitið alt valskeiðið út, men nú val er í ótíð, gevst hon kortini. Hevði val ikki verið útskrivað, hevði hon ætlað at sagt frá alment 8. november, tá skeiðið hevði verið hálvrunnið, at hon fór at leggja frá sær.

- Eg seti meg ikki føra fyri at halda fram longu, tí eg halda meg ikki hava nakað nýtt at geva flokkinum, og tá er best at gevast. Men politikkur vil altíð vera ein partur av mínum livi, sigur hon.

Karin heldur tað ikki kunna bera nøkrum til at halda fram ár út og ár inn at hava fleiri arbeiði og røkja tey til fulnar. Nú ætlar hon at hava arbeiði sítt á Kriminalforsorgini burturav. Av øllum hevur tað arbeiði altíð staðið hjarta hennara næst, sigur hon.

Karin Kjølbro hevur áður sagt, at yngri menn í flokkinum onkuntíð hava sett hana til viks við sínum albogum. Men, nú hon gevst, er Karin hvørki fornermað ella er traðkað á tærnar meira enn vanligt.

Hon svarar ikki rættiliga upp á spurningin, hvat flokkurin missir við, at hon ikki verður á listanum.

- Skal talan vera um kvinnur, so eru fleiri frammaliga í flokkinum, og tá eitt pláss verður leyst, verða tað alt´íð fólk at kappast um plássið, sigur Karin Kjølbro.

randi



Karin Kjølbro pakkar nú saman í tinginum og fer at arbeiða á Kriminalforsorgini burturav

Oddfríður bjóðar Ingeborg samstarv

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við Ingaborg Vinther í, at útlendingar eiga at fáa loyvi at gera íløgur í Føryum fyri at útvega fleiri arbeiðspláss - men ikki fyri at fáa fisk sum rávøru

Herfyri segði Ingeborg Vinther í fjølmiðlunum, at hon var fyri at útlendingar komu til Føroya at gera íløgur í føroyska vinnulívið fyri at fáa fleiri arbeiðspláss í landinum.

Hetta dámdi Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum bjóðar Føroya Arbeiðarafelag samstarv um henda spurning. Arbeiðsgevararnir lova, at teirra partur ikki skal liggja eftir.

Men útlendingar mugu ikki koma higar at gera íløgur, um teir samstundis skulu nýta okkara fisk sum rávøru. Tað gevur ikki fleiri arbeiðspláss heldur øvugt. Fyri at fáa fleiri arbeiðspl´áss í fiskiídnaðinum, má fiskurin viðgerast meira enn hann verður í dag, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevararnir vænta ikki, at nakrar útlendskar fyritøkur koma til Føroya uttan fyrst at kanna nøkur viðurskifti. Teir fara at kanna partafelagsskatt og partafelagslóggávu, møguleikan fyri at fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi, útbúgvingarmøguleikar, lønarlagið, kostnaðarstøðið sum heild, flutningsmøguleikar, organisatiónsviðurskifti og rættarskipanina á arbeiðsmarknaðinum. Tí alt hetta hevur nakað at siga fyri kappingarførið hjá eini vinnu í landinum.



Oddfríður Gregersen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeðarafelag, eru ikki altíð líka samd, tá tey hittast. Nú tekur Oddfríður undir við Ingeborg, at útlendskar fyritøkurskulu sleppa til Føroya at gera íløgur, og hann bjóðar Føroya Arbeiðarafelag samstarv

EISINI LEIÐSLAN

Miðalløn í Føroyum samanborið við onnur lond sigur ikki alt. Eitt annað er effektiviteturin. Arbeiðsgevararnir siga, at vanlig blokkframleiðsla kostar 54 % meira at framleiða í Føroyum enn í Danmark., sjálvt um lítil munur er á tímalønini í londunum báðum. Hetta sigur nakað um,at tað er ikki útgoldna lønin einsamøll, sum er avgerandi fyri, hvat vøran kostar.

- Hetta er ikki sagt fyri at kasta føroyskum arbeiðarum nakað fyri, men hetta mugu bæði leiðsla og arbeiðsfólk taka til eftirtektar. Avgerandi er, at hesi viðurskifti kunnu viðgerast sakliga fyri at komast kann ásamt um, at báðir partar - arbeiðsgevarar og arbeiðrar og feløg teirra - gera sítt fyri at økja um okkara kappingarføri, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag,ið leggur upp til samstarv millum partarnar um tey mál, tey hava ávirkan á.

Arbeiðsgevararnir vænta annars ikki, at nøkur útlendsk virki hava hug at gera íløgur í Føroyum, tá tey frætta, at tey mugu fylgja kollektivum sáttmálum við fakfeløgini uttan at hava trygd fyri, at friður er í sáttmálaskeiðinum, sjállvt um tey í øllum halda sáttmálan.

- Hetta er ikki ætlað og verður vónandi ikki heldur uppfatað sum eitt álop á nakran, men sum ein roynd at beina orðaskiftið yvir á konkret mál, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag at enda í opna skrivi sínum.

EM

Vit vera í
PARKINI
10. okt.
Danmark-Føroyar